Fyri børn kl. 19^{30}

Radisurnar



Sørin Brun heldur, at hundurin Nuser eigur at gera annað og meira enn bert at eta og sova. Tí biður hann hundin fara á bókasavnið at lána bøkur.

Sørin Brun veit ikki, hvat honum væntar, tá hundurin kemur aftur við bókunum. Nuser hevur lænt eina gandabók. Framforslan gongur væl til Sørin Brun brádliga verður gjørdur ósjónligur. Tað riggaði væl, men bert veit Nuser ikki, hvussu hann skal ganda Sørin Brun fram aftur ...

Kina — innan fyri múrin

Undir heitinum »At liv við kollveltingini«, byrja nú ein sendirøð um Kina, trimum pørtum.

Ein bretskur filmbólkur fylgdi í 1982 trimum familjum í tveimum smærri landkommunum norðanfyri Shanghai. Tilsamans eru ymsu arbeiðir teirra ein avspegling av nútíðar samfelagnum í Kina.

Familjurnar eru í ymsum aldursbólkum, og tað hevur við sær, at vit fáa innlit í søguligu menningini, sum er farin fram seinastu 50 árini. Frá hungursneyð ogkúgan, japansku innrásina og yvirgangin til Mao kollveltingina, mentunarkollveltingina og fram til nýggju evnismentanina og ábyrgdarskipanina, sum er í dag.

Aftaná kúganina byrjar einstaklingurin nú alt meira at koma til sjóndar við persónligu hugsan síni. M. a. í klæðnabúnanum. Brøkurnar smalkast, klæðini eru sum heild meira litbjørt, og nú sæst av og á, at kvinnur nýta smyrsl.

sjónvarp

Týsdagin 21. august

19.30 *Radisurnar*
20.00 *Dagur og vika*
20.30 *SV-aktuelt*
21.15 *Kina 1* (3)
22.10 *Langa ferðin*
23.20 *Liðugt*

Í kvøld kl. 20.30:

Loyndarmál til sølu

SV—aktuelt hesaferð snýr seg um danskar fyritøkur. Spurningurin er, um danski staturin selur handilslig loyndarmál fyri lítið og einki, sum útlendskar fyritøkur nýta gott av.

Tað er við hesum í huga, at ein ósemja hevur tikið seg upp millum fyritøkuna Superfoss og danska Monopoltilsynet.

Superfoss krevur, at Monopoltilsynet steðgar eini frágreiðing um tøðframleiðslu. Fyritøkan vísir á, at tøl og upplýsingar eru loyndarmál innan yrkisfelagið. Tað kann hava við sær, at henda frágreiðing kann tarna fyritøkuni og møguliga verða atvoldin til, at arbeiðspláss verða niðurløgd.

SV—aktuelt kannar ósemjuna og viðgerð virksemið hjá Monopoltilsynet í mun til vinnulivið. Eisini roynir SV—aktuelt at kanna, um tað er neyðugt við eini broyting innan monopollóggávuna.

Kollveltingin á gamalsaldri

Av tí at eg ikki hevði stundir at hyggja sjónvarp í vikuskiftinum, verður bert sjónvarpsleikurin »Rýmingin ummælt á hesum sinni. Hetta var seinasta sending sunnukvøldið, og viðgjørdi hon gerandisdagin hjá tveimum eldri kvinnum, sum vóru komnar ásamt um, at tær vildu hava meira burtur úr á gamalsaldri, enn bert at ansa familju og avvarandi.

Báðar kvinnurnar høvdu bert havt eina uppgávu í lívinum, og tað var at ganga øðrum til handa.

Tá leikurin byrjar, liggur onnur kvinnan í seingini. Hin stendur og iðkar fimleik, og er ógvuliga virkin og hevur dirvi at fáa íbúðina gjørda lidna, sum tær júst eru fluttar í. Hin í songini hugsar bert um, at hon skal upp at gera morgunmat, men hon kemur sær ikki fram. Tær fara kortini undir at fáa eitt áklæði upp at hanga. Trupulleikin er bert, at fáa gardinstongina festa. Veikleikin er, at henda virkna eldra kvinnan ikki dugir at halda einum skrúvublaði, tað er óhugsandi. — serliga tá vit fáa at vita, at hon altið hevur syrgt fyri sínum.

Tær fáa ongan morgunmat, ei heldur kemur áklæðið upp, tær megna ikki at fáa nakað frá hondini.

Tann virkna bregar tí veiku og sigur: »Munurin millum okkum báðar er, at eg havi viljastyrki. — Tí sita vit báðar her«. Her sæst nágreiniliga, at tann veika framvegis er í sínum egna leikparti, og at hin hevur tikið leikpartin upp, sum lýsir »mannin« í samspæli teirra.

Tað er nærum ein Strindbergskur dámur yvir samlívi teirra. Onnur letur sær alt lynda, eisini tá hon ikki fær loyvi at tosa við síni kæru, tí hin væntar, at hon fer at fortala seg, og familjan skal fáa greiðu á, at alt ikki rillar so væl sum tað eigur.

»—Mennesket har ikke værre fjende end sig selv«, sigur hin virkna, og leggur aftur at: »Det ser jeg, hver gang jeg ser på dig!«. Ætlanin hevði verið at funnið fram til egna virði, men bert hava kvinnurnar gloymt, hvat tað er. Tær droyma um at fara út um kvøldarnar á matstovu og ølstovu, har kanska eisini dansur er. Tær droyma um at hava ein vin. Ikki sørt, at tann virkna hevur hug at fáa sær eitt mannfólk eisini. Hon tosar við ein mann í telefonini, sum biður hana koma at hitta seg. Hon ger seg tilreiðar, og fær at enda tikið seg saman, at fara út um dyrnar. Tá eins og loysnar trýstið fyri tí veiku. Hon ringir heim og sigur, at hon kemur heimaftur beinanvegin

Hon pakkar kuffertið og setst at bíða, til hin kemur heimaftur. Tá verða vit var við, at hon kanska hevur ímyndað sær alt hetta, og kanska er eingin maður tilstaðar í veruleikanum.

Samanumtikið var leikurin ógvuliga væl uppbygdur og lýsti nágreiniliga, hvat hendir, um lívið fær ov bráða broyting á gamalsaldri. Frá at virka og hava ábyrgd í gerandisdegnum, verða hesar báðar kvinnur til tómar verur, sum — tá tær fáa møguleikan, at vera til fyri egnu skyld, ikki, vita, hvat tær skulu gera av sær sjálvari.

Lív teirra hevði meining, so leingi sum onkur hevði brúk fyri teimum. Tá tað ikki var veruleiki meira, datt alt niður fyri. Um vit hugsa okkum, at eldri fólk verður koyrt á ellisheim, og tá henda hátt avskorin frá gerandisdegnum, so sum hesin hevur formað seg í eitt langt lív, so er tað sum at vera livandi deyður, um ikki okkurt er at seta ístaðin tað, sum hevur verið innihaldið í lívinum higartil.

Rýmingin hjá kvinnunum var sostatt miseydnað.

Slík kollvelting, at bróta upp úr gomlum, er helst ikki hóskandi fyri eitt gamalt menniskja. Hjá teimum veldst helst um at varðveita tilknýtið til kenda umhvørvið, tí hetta fyri einstaklingin gjøgnum eitt heilt lív, hevur virðir í sær sjálvum. Uppreisturin hjá teimum gomlu í sjónvarpsleikinum prógvaði tað.

Spurningurin er bert, um samfelagið loyvir teim gomlu at taka avgerð um, hvat skal henda á gamalsaldrinum, og hvussu stór rúmdin er fyri teimum í gerandisdegi okkara.

Kirsten Rolffes og Tove Maes spældu leikpartar sínar eins framúrskarandi, sum tær á danska leikpallinum hava roynst í eitt mannaminni.

Dagny Joensen